Álit

í

løgtingsmáli nr. 49/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a. (Broyting í mótrokning av pensjón)

Bárður á Steig Nielsen, Erhard Joensen, Helgi Abrahamsen, Magnus Rasmussen, Eyðdis Hartmann Niclasen og Kaj Leo Holm Johannesen, løgtingsfólk, hava vegna Sambandsflokkin lagt málið fram 3. november 2023, og eftir 1. viðgerð tann 16. november 2023 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 16. november 2023.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin býtt seg í tríggjar minnilutar.

Ein minniluti (Jørgen Niclasen og Árni Skaale) hevur hesar viðmerkingar:

Hesin minnilutin er sannførdur um, at tað altíð skal loysa seg at arbeiða, eisini tá ein gerst eldri. Undanfarna samgonga lækkaði mótrokningina í fólkapensjónini frá 60% niður í 20%. Tað merkir, at einans 20 kr. verða mótroknaðar fyri hvørjar 100 kr. í inntøku. Men inntøkumarkið varð samstundis lækkað frá 61.900 kr. niður í 45.000 kr. Júst hetta síðsta hevur fingið mest uppmerksemi.

Hetta markið er alt ov lágt, tí talan er ikki bara um arbeiðsinntøku, men eisini útgjald frá egnari eftirlønaruppsparing. Tað merkir fyri rættuliga nógv, at mótrokningin byrjar frá fyrstu lønarkrónu.

Fyritíðarpensjónistar kunnu forvinna 90.000 kr., áðrenn mótrokning byrjar. Minnilutin heldur, at rættast er at líkastilla fyritíðarpensjónistar við pensjónistar, tá talan er um mótrokning.

Tá ein fer um pensjónsaldur, sleppur ein undan at rinda sosial gjøld, sum t.d. til Samhaldsfasta, barsilsgjald og ALS. Hinvegin fær ein útgjald úr Samhaldsfasta. Sáttmálarætturin til eftirlønaruppsparing verður útgoldin sum eyka løn, tá ein er komin til pensjónsaldur.

Ein kann eisini útseta fólkapensjónina og so fáa eitt hægri útgjald seinni. Rættuliga nógv hava valt henda møguleikan. Um eingin mótrokning verður, so er lítið sannlíkt, at fólk útseta sína pensjón.

Víst verður til viðmerkingar og broytingaruppskot frá hesum minnilutanum til løgtingsmál nr. 21/2023.

Við hesum viðmerkingum tekur hesin minnilutin ikki undir við uppskotinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Ein annar minniluti (Johan Dahl og Kaj Leo Holm Johannesen) hevur hesar viðmerkingar:

Eins og í áður framlagda uppskoti okkara um avtøku av mótrokningini hjá pensjónistum so er Sambandsflokkurin av teirri áskoðan, at tað altíð skal loysa seg at arbeiða. Tað er eisini galdandi fyri pensjónistar, sum hava vilja, orku, heilsu og hug til tess.

Tað eru fleiri fyrimunir av at gera tað áhugavert hjá pensjónistum at arbeiða:

- Betrar lívsgóðskuna - liva betur og longur
- Lægri kostnaðir til heilsu og umsorgan
- Økir um arbeiðsútboðið

Við verandi skipan er tað ikki áhugavert hjá einum fólkapensjónisti at arbeiða, tá ársinntøkan fer uppum 60.000 kr., tí tá missir viðkomandi brennioljustuðulin, og marginalskatturin av lønini verður um 87%. Hetta tekur allan hugin at arbeiða frá pensjónistinum.

Til samanberingar kann nevnast, at danir hava tikið seinasta partin av mótrokningini av pensjónum burtur. Hetta er gjørt sum ein liður í at økja um arbeiðsútboðið, sum tað sanniliga er brúk fyri í Føroyum, her stórur tørvur er á arbeiðsmegi í flest øllum geirum, serliga innan røktar- og umsorganar-økið.

Sambandsflokkurin vil við hesum uppskotinum avtaka mótrokningina, tí vit halda, at hon er ein stór forðing fyri, at fleiri hendur í arbeiðsførum aldri vilja arbeiða - tað er ikki í lagi. Landsstýriskvinnan hevur upplýst fyri Trivnaðarnevndini, at til dømis innan røktarheim er trupult at fáa fólk, ið eru 67 ár ella eldri, at taka vaktir, eftir at tey eru komin uppum markið, sum verður mótroknað.

Fíggjarligu avleiðingar, sum standast av at avtaka mótrokningina, eru av Almannaverkinum mettar at verða umleið 55 mió. kr. + 25 mió. kr. = 80 mió. kr. tilsamans brutto árliga. Talan er um hægri útreiðslur fyri landskassan til pensjónir - upphæddir, sum áður vórðu reguleraðar niðureftir vegna arbeiðsinntøku.

Hinvegin kann væntast, at um arbeiðsinntøkan hjá t.d. 750 fólkum hækkar frá 45.000 kr. upp til 200.000 kr., so verður skattainntøkan umleið 40 mió. kr. hægri árliga.

Harumframt kann roknast við, at ein hægri inntøkuupphædd hjá pensjónistum fer í umferð og gevur fleiri nýtsluinntøkur. Um pensjónistarnir fáa eina hægri inntøku á 116 mió. kr. og hægri pensjónir á 55 mió. kr. verða útgoldnar, tá mótrokningin verður avtikin, og vit siga, at 30% kemur inn í mvg og øðrum umsetningsavgjøldum, gevur tað aðrar 40 mió. kr. meira í almennu kassarnar. Samanlagt gevur hetta 80 mió. kr. meira í almennu kassarnar, 40 mió. kr. meira í skatti og 40 mió. kr. meira í nýtsluinntøkum.

Endaliga kostnaðin kenna vit ikki, fyrr enn skipanin hevur virkað í nøkur ár, og tá ber til at eftirmeta hana. Alt eftir, hvat úrslitið vísir, kann lógin tillagast ella ein onnur loysn verða funnin.

Landsbankin og Búskaparráðið, sum hava verið í Trivnaðarnevndini í sambandi við málið, hava lýst fíggjarligu avbjóðingina við at avtaka mótrokningina, tí mett verður, at haldførið hjá landinum verður sett i váða.

Vit halda hinvegin, at um samráðingar millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum ikki hava megnað at lyft sinar bólkar á eitt støði, sum ger tað liviligt hjá teimum, so eigur tað ikki at verða pensjónisturin, sum eigur at bøta fyri tað. Um hvørki pensjónistar ella lægst løntu lønarbólkar klára seg fíggjarliga, so er støðan ikki nøktandi í einum ríkum vælferðarsamfelag.

Siðvenja er, at lønarsamráðingar verða avgjørdar millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum, men hinvegin, so er tað okkara politiska uppgáva at finna eina skilagóða loysn á, hvussu pensjónistar skulu kunna arbeiða, eftir at teir hava nátt pensjónsaldurin, um hugur framvegis er at arbeiða.

Allir teir stóru flokkarnir lovaðu áðrenn valið at gera tað møguligt hjá pensjónistum at arbeiða, og eisini at avtaka mótrokningina, og vilja vit tí mæla til at halda givin lyftir og samtykkja uppskotið.

Við hesum viðmerkingum tekur hesin minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Ein triði minniluti (Súsanna Bertholdsen, Liljan Weihe og Hans Jacob Thomsen) hevur hesar viðmerkingar:

Eitt mál frá samgonguni um at hækka markið fyri mótrokning, løgtingsmál nr. 21/2023, er í løtuni til viðgerðar í Løgtinginum.

Við hesum viðmerkingum tekur hesin minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 6. desember 2023

Jørgen Niclasen formaður	Liljan Weihe næstformaður	Kaj Leo Holm Johannesen
Johan Dahl	Árni Skaale	Hans Jacob Thomsen
	Súsanna Bertholdsen	